Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	24. januar 2024
Mál nr.:	23/24237
Málsviðgjørt:	KÁ/JEB
Ummælistíð:	
Eftirkannað:	06.12.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki
(Hægri fíggjarkarm)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 65 frá 4. mai 2022 um at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki verður í § 1, stk. 2 “54 mió. kr.” broytt til: “56 mió. kr.”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í 2022 samtykti Løgtingið løgtingslóg um at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Lógaruppskotið, sum tá varð samtykt, er ein liður í at loysa stóra bústaðatrupulleikan hjá fólki, ið bera brek og hava tørv á vardum bústaði í Suðurstreymoy.

Nú næstan er komið mál við byggingini í Reynstúni á Argjum, hevur Landsverk staðfest, at vegna príshækkingar, longda byggitíð o.a. er tørvur á hægri fíggjarkarmi.

Talan er í alt um 2 mió. kr. útgreinað soleiðis:

Indeksregulering (eyka) .....800.000 kr.
Longd byggitíð .....800.000 kr.
Eyka tiltakspeningur .....400.000 kr.
Í alt .....2.000.000 kr.

Sambært galdandi verklagslóg er heimilað landsstýrismanninum at nýta í mesta lagi 54 mió. kr. til at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki. Landsverk metir ikki, at til ber at halda hesa áseting, og tørvur er tí á at hækka fíggjarligu heimildina við 2 mió. kr. til 56 mió. kr.

Almanna- og mentamálaráðið hevur spurt Landsverk, um tað ber til at umraðfesta soleiðis, at hildið verður á við byggingini til tess at fáa bygningin bygdan lidnan, fyri síðani at útvega hægri játtan til at keypa innbúgv og tól. Settar eru 1,8 mió. kr. av til at keypa fast og leyst innbúgv, sum ikki er disponerað, og 475 tús. kr. eru ikki disponeraðar til tól. Til ber at útseta hesi innkeyp til heimildin er hækkað, uttan eyka kostnað. Sambært galdandi tíðarætlan skuldi byggingin verða liðug ultimo februar 2024, men vegna longdu byggitíðina verður hetta seinkað í nakrar mánaðir.

Tær 2 mió. kr. eru tøkar í samlaðu játtanini í fíggjarlógini fyri 2024 á høvuðskontu 12.21.6.02.

1.2. Galdandi lóggáva
Løgtingslóg nr. 65 frá 4. mai 2022 um at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Lógaruppskotið er ein liður í at loysa stóra bústaðatrupulleikan hjá fólki, ið bera brek og hava tørv á vardum bústaði í Suðurstreymoy.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at hækka fíggjarligu heimildina, soleiðis at verkætlanin kann gerast liðug.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at hækka fíggjarligu heimildina, ið landsstýrismaðurin kann nýta at byggja sambýli sambært nýggju kostnaðarmetingini.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er gjørt í samráð við Landsverk og Fíggjarmálaráðið. Av tí, at broytingaruppskotið snýr seg um at hækka fíggjarkarmin, hevur broytingaruppskotið ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Í 2024 verður verkætlanin 2 mió. kr. dýrari, so samlaði fíggjarkarmurin hækkar úr 54 mió. kr. upp í 56 mió. kr. Játtan er tøk í samlaðu játtanini á fíggjarlógini fyri 2024, t.e. játtan og framflutt játtan, m.a. orsakað av, at verkætlanin at byggja Sambýlið á Mýrini gjørdist nakað bíligari enn lagt varð upp fyri.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri byggivinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri ávísar samfelagsbólkar við tað, at talan er um príshækkingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk. Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesa viðurkendu áseting.

2.9. Markaforðingar
Ongar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýriskvinnuna, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýriskvinnuni at nýta upp í 56 mió. kr. til at gera byggiætlanina lidna.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Fíggjarliga heimildin verður hækkað úr 54 mió. kr. upp í 56 mió. kr. til at gera verkætlanina Sambýli í Reynstúni lidna.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Almanna- og mentamálaráðið, 24. januar 2024

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Skriv frá Landsverk